5 Sparikassin

Ein vinmaður Jákups, Árant gongur í 8. flokki. Hann vann 10 000 kr í V4. Av vinninginum verða tikin 15% í skatti, og Árant setti tað, ið eftir var av peninginum, í Sparikassan.

a Hvussu nógv setti hann inn í sparikassan?

Hann fær 5% um árið í rentu frá Sparikassanum. Hann letur peningin standa í sparikassanum í 6 mánaðir.

b Hvussu nógvan pening fær hann í rentu?

6 Pythagoras og tríhyrningar

Tekna tríhyrningin **ABC** inn í eina krossskipan; har eindin er 1 cm

A: (2,6) **B: (7,2)** **C: (2,2)**

a Rokna longdina á linjustykkinum ~~BC~~ AB $a^2 + b^2 = c^2$

b Rokna víddina á tríhyrninginum.

7 Krossskipan - linjur

Í eini krossskipan eru punktini **A: (3,5)** og **B: (-4,-2).**

a Set punktini inn í eina krossskipan, har eindin er 1 cm

Gjøgnum punktini **A** og **B** gongur linjan **m**

b Skriva forskriftina fyri linju **m**

8 Líkningar

Loys líkningarnar:

a $6x - 14 = 10$

b $3x + 8 - (4 + 2x) = 6 (2x + 1) + 9$

TOFTA SKÚLI

ROKNING/STØDDFRØÐI

4 TÍMAR

Svarini hjá tær verða eisini dømd eftir, hvussu tú dugir at siga frá, hvat tú gert og hví.

1 Til handils

Ein dagin avgreiddi jákup eina konu, ið keypti hesar vørur	1 mjólkapakka	8,95 kr
	1 posa við eplum	14,95 kr
	1 pk. við eggjum	7,95 kr
	1 pk. við malnum neytakjøti	33,50 kr

a Hvussu nógv kostaðu vørurnar?

Á pakkanum við neytakjøti stóð, at hann vigaði 1,5 kg.

b Hvussu nógv kostaði 1 kg av neytakjøti?

Avsláttur var av ymsum vørum. Til dømis var prísurin fyri 1 kg av kulottusteik settur niður úr 139,95 kr í 85,00 kr.

c Hvussu nógv var avslátturin?

Ein kulottusteik vigaði 1,4 kg. Eisini hesa keypti konan.

d Hvussu nógv kostaði kulottusteikin?

e Hvussu nógv fekk konan aftur, tá ið hon rindaði fyri alt, hon keypti, við einum 500 kr seðli?

2 Sápudunkar

Jákup sær, at ein sápudunkur rúmar 0,750 litrum uppvaskisápu.
Á dunkinum verður viðmælt, at vit brúka 5 ml av sápu til 1 uppvask.
1000 ml = 1 litur

a Hvussu nógv uppvask røkkur sápudunkurin til?

Í handlinum eru tvey sløg av uppvaskisápu:

Slag	Rúmd	Prísur	Nýtsla fyri hvørt uppvask
A	½ litur	5,95 kr	10 ml
B	750 ml	9,95 kr	5 ml

b Rokna, hvat slag av uppvaskisápu er tað bíligara at brúka?

3 Gekkurin

Í eini kiosk kanst tú keypa seðlar til fleiri eydnuspøl. Eitt teirra er Gekkurin hjá Sjónvarp Føroya.

Gekkahjólið er býtt í 24 eins deildir: tveir gekkar, tveir krússapottar og 20 aðrar deildir við ymiskum vinningum.

Gekkahjólið



Vinningar:

Um tú fært fulla plátu og sleppur at snara gekkahjólið, hevur tú longu vunnið:
- eitt uppihald á hotelli – virði 2000 kr
- 500 kr fyri ta fullu plátuna, tú hevði

Um tú, tá ið tú fert at snara, rakar eina deild, ið ikki er Gekkur ella krússapáttur, vinnur tú afturat:
- vinningin, tú snarar teg til.
- 1% av upphæddini á tí størra gekkinum.

Vit hugsa okkum at Jákup var so heppin og slapp at snara gekkahjólinum. Hann endaði á deildini við 6500 kr. Tann størri gekkurin var hesa vikuna 150 000 kr

a Hvussu nógv hevði Jákup vunnið tilsamans?

b Hvussu stórur er møguleikin at fáa annan gekkin ella annan krússapottin, um tú bert snarar 1 ferð?